Nr. 8 | 15. desember 2007 | 60. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

# JESUS, FRELSARI OKKARA

Hvat ynskir tú tær til jóla? Hetta er ein sera vanligur spurningur, ið vit fáa settan hesa tíð av árinum. Tað verður bara truplari og truplari at finna uppá, hvat ein skal keypa tí einstaka, tí vit eiga jú tað mesta, ið okkum tørvar. Vit liva í eini tíð, ið er merkt av yvirflóð og verðsligum lutum.

Kom nú ein dagin at tosa við ein eldri mann á einum barnaføðingardegi, har føðingardagsbarnið ikki var so áhugað at pakka upp gávurnar, tað fekk. Barnið hevði ikki stundir at hyggja eftir, hvat tað hevði fingið í tí fyrsta pakkanum, tí tað var meira spennandi at hyggja, hvat var í næsta pakkanum. Hesin eldri maðurin segði, ja so fínar bilar, hevði hann ongantíð átt, teir bilar, hann átti at spæla við sum smádrongur, var hann noyddur at telgja sær sjálvum. Ja, nógv er broytt eftir fáum árum, kann ein siga. Jólagávurnar eru eisini munandi størri nú enn tær vóru fyrr. Tað var nú ikki ætlan mín at verða so atfinningarsamur ímóti siðvenjuni og jólagavuni og taka gleðina frá tykkum av at geva. Umhugsni og eftirtekt koma væl við á hesa køldu og myrku árstíð. Eg skuldi óivað heldur ístaðin sett spurningin: Hvat tørvar mær mest



Øllum lesarum okkara og missiónsvinum burturi og heima verð ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk fyri tað farna.

Kirkjuliga Missiónsfelagið

til jóla? Tit hóma óivað, at eg vil fram til tað mest virðismikla, sum hevur við jólini at gera, boðskapin, sum ljóðaði á markini uttanfyri Bethlehem, " Tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávid staði. Tann týdningarmesta gávan, varð givin øllum menniskjum fyri meira enn 2000 árum síðani. Ì dag sær tað út til, at hesi tíðindi fáa lítla blaðrúmd afturímóti øllum teimum óneyðugu verðsligu lýsingum viðvíkjandi lutum, ið gera skulu okkum lívið lættari at liva.

Er tørvurin ikki hin saman sum fyrr, tá ið tað ræður um frelsu og ævigt lív? Vit fara 2000 ár aftur í tíðina inn í eitt fjós. Hevur tú nakrantíð verið í einum fjósi, hugsa tær eitt lítið myrkt fjós, har inni eru kýr, seyðir, grísar, hoyggj, flugur, eiturfon ella eiturkoppanet og mangt annað. Kundi tú hugsað tær at hildið føðingardag har, ivasamt. Men Jesus varð føddur í einum slíkum fjósi, ella kanska tað var inni í einum helli. Maria átti son sín hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu, tí at ikki var rúm fyri teimum í tilhaldshúsinum. Ì einum skitnum fjósi varð hann, sum er heimsins frelsari, føddur. Ì eina skitna krubbu, varð hann lagdur, sum er skapari og Harri. Hvør er hann, sum er føddur í fjósinum í Bethlem? Jólaevangeliið lærir okkum nógv um hetta. Einglarnir boðaðu, at hann var ein frelsari. Men hann er ein serligur frelsari. Tá ið vit royna at ímynda okkum Jesu føðing, hava vit lætt við at hálova hesi hending, sjálvt um vit vita, at hann varð føddur undur fátæksligum umstøðum, hava vit lætt við at gera alt so romantiskt og fínt. Vit vita, at hann varð føddur í einum fjósi, men vit hugsa okkum, at tað má hava verið eitt serliga fínt fjós, ella eitt fínt helli; við tað at hann varð lagdur í eina krubbu, men vit hugsa okkum, at tað var ein heilt serstøk

ANDAKT

## Læra at elska

*Vit elska, tí at hann elskaði okkum fyrst* 1.Jóh. 4,19.

Jesus elskaði okkum fyrst, áðrenn vit av sonnum kundu elska. Vit vóru farin burtur frá Guði, tí vit høvdu brotið boð hansara. Tí kundu vit ikki elska eins og Jesus elskar, men hann kom í heimin við sínum kærleika. Guð sendi hann til okkara av kærleika, so at vit kundu síggja kærleika Guðs í Jesusi. Henda Guðs kærleiksgerð yvirgongur allar aðrar kærleiksgerðir, sum heimurin hevur sæð, sær og fer at síggja so leingi heimurin stendur.

Jesus kom í heimin fyri at vísa okkum sín kærleika, so at vit aftur skuldu kunna læra at elska Guð og tæna honum. Jesus vísti okkum sín kærleika við at lata sítt lív fyri okkum á Golgata, sum loysigjald fyri allar syndir okkara, ið vit hava gjørt, gera og koma at gerða. Men uttan uppreisnina páskamorgun hevði hetta verið til fánýtis, tí kunnu vit gleðast um og í taksemi taka ímóti hesi Guðs kærleiksgávu. Taka vit ímóti Guðs kærleiksgávu, so eru vit umfavnaði av Jesu kærleika.

Kisti himmalferðardagur er akkurát farin aftur um bak, dagurin, sum minnur okkum á, at vit ikki eru gloymd av Kristusi. Men at vit eiga eina livandi vissu um, at Kristus kemur aftur at heinta síni heim. So vit elska, tí at Jesus elskaði okkum fyrst, soleiðis lærdu vit aftur at elska Guð.

*Eins og faðirin hevur sent meg, soleiðis sendi eg tykkum* Jóh. 20,21. Guð sendi okkum Jesus av kærleika, Jesus sendur okkum við Heilagum Andans hjálp, at boða Guðs kærleika í Kristi Jesusi. Latum okkum tí fara út í Heilagum Anda, og boða tann frelsandi kærleikan, sum vit hava fingið lut í. Soleiðis at tey, sum ikki eiga lut í Jesu frelsandi kærleika, skulu kunna læra at elska og fáa lut í hansara frelsandi kærleika. Amen.

Skriva hevur:

Fríðleif Lydersen.

krubba. Hví gera vit tað? Tì vit ikki eru heilt til reiðar at ímynda okkum, at Jesus, hann sum er okkara frelsari, varð føddur á verðsligan hátt og undir slíkum fatæksligum korum. Vit í Føroyum, sum liva undir framúr góðum viðurskiftum, duga ikki, ella hava ikki evni, at ímynda okkum, hvussu fatæksligt, tað hevur verið. Tað hevur veruliga verið eitt dálkað og ódámligt fjós. Tað var kalt, skitið, og so hevur roykurin verið ramur. Hví setti hann seg so lágt? Hví eyðmýkir hann seg á henda hátt; hann sum er Harrin og Gud. Tað er frammi í okkara tíð, at summi halda, at Jesus var eitt so eyðmjúkt menniskja, at hann kom fyri at sýna samhug við øllum teimum veiku og fátæku á jørð. Og sjálvandi, er hetta til stóra troyst og ugga hjá øllum fátækum at vita, at Gud verður sum ein av teimum. Tað er ikki nøkur serstøk hjálp í hesum, at ein, sum er ríkur, hevur samhug við tey fátøku og verður sum ein av teimum. Um ein ríkmaður sýnir samhug við onkran av teimum fátæku á gøtuni, hevði hann fingið nógva umtalu í fjølmiðlunum. Men tann fátæki hevði ikki fingð tað betur. Tann fátæki hevði bara fingið tað betur, um hesin ríki, hevði givið burtur av ríkidømi sínum. Tann fátæki kann bara fáa tað betri, um hann gerst ríkari. Tað er nevniliga tað, sum Jesus ger. Hann, sum er so ríkur, ikki fyri at sýna samhug við teimum fátæku, men fyri at gera tey fátæku rík Fil.2,8. Hann vildi gera tey veruliga rík, ikki við at geva teimum pening og verðsligt góðs, men at tey kunna gerast rík í Gudi, rík í dýrdleika og æru, rík í rættvísi. Tá ið Jesus gerst so fátækur, so vísir hann okkum álvarsemið í tí, syndin hevur at bjóða okkum. Samstundis vísir hann okkum, hvussu ótrúliga stórur Guds kærleiki er. Okkara synd ger okkum óendaliga fátæk fyri Gudi. Allur hesin heimur sum vit búgva í, er fyri Gudi sum eitt skitið fjós.Tað sær ikki væl út í hansara eygum. Roykurin, sum stígur upp frá okkum, er ikki dámligur. Nógvir av okkara hugsanum, orðum og gerðum eru dálkað. Niður til henda heim steig Gud sjálvur og gjørdist menniskja eins og vit. Hann varð føddur í einum skitnum fjósi fyri at hjálpa okkum út úr okkara ósigandi fátækadømi og knýta sambandið aftur, sum vit høvdu mist við Gud. Luther yrkir í sálminum:



**Lov tær, Jesus,**
**vár sangur ber**,

sum er nr: 109 í

Sálmabókini í 5. versinum:

Fátækur gekst tú her foldum á,
Signing tú breiddi á armóðs strá,
Við tíni fátækt vit vórðu rík,
Eina hjá tær finst miskunn slík.
Gud havi lov!

Tað var tí, hann kom. Jesus varð fátækur, og eg og tú gjørdist rík, sigur sálmaversið. Frá krubbu til kross. Henda veg gekk hann fyri teg og meg. Tí á krossinum sónaði hann alla synd, sum eg og tú hava gjørt móti Gudi, krubban og krossurin hanga neyvt saman. Tí er tað ógjørligt at slíta tey frá hvørjum øðrum.Tí bæði eru so týdningarmikil í hansara frelsugerningi. Hann varð føddur sum eitt fátækt, lítið barn, fyri at doyggja á einum krossi fyri okkara syndir. Gud fái tøkk, tí hann varð fátækur, og tú og eg gjørdist rík.

Gleðilig jól!

Hanus Simonsen
Skrivar

# Ríki maður og Lázarus Luk. 16, 19-31.

## Úr bókini Sæden er Guds ord Øivind Andersen

Suni Jacobsen,
týðir.

Hetta líknilsið er av øðrum slag, enn tað vit hava sæð í Matteus Evangeliinum. Her snýr tað seg ikki um myndatalu ella hugsaða søgu., men Jesus nýtir eitt dømi úr veruliga lívinum, sum hann sýnir okkum, til tess at vit skulu læra av tí.

Hjá Lukkasi eru fleiri líknilsi av tí slagnum. Fyrimyndarfrásagnir er kanska besta heiti, vit kunnu geva teimum. Jesus talar um ting, sum veruliga henda og um persónar, ið lýstir verða fyri okkum, annaðhvørt til ávaringar ella eftirfylgingar og lærdóms. Umframt hetta líknilsið um Ríka mann og Lásarus, hava vit líknilsið um hin ríka bóndan (12, 16 - 21), Farisearan og Tollaran (18, 9 - 14) og vit kunnu eisini nevna líknilsið um Hin Miskunnsama Samariubúgvan (10, 25 - 37), hóast hetta líknilsið ikki er ein fyrimyndarfrásøgn á sama støði sum hini. Í frásøgnini um Ríkamann og Lazarus, sýnir Jesus okkum tvey menniskju, sum í mannaeygum høvdu verið mett sum eitt eydnuríkt og eitt eydnuleyst menniskja. Men hann vísir okkum, at tað er tað eydnuríka menniskjað, ið er eydnuleyst, og tað eydnuleysa, ið er eydnuríkt. Um ríka mann verður sagt, at hann livdi hvønn dag í fagnaði og góðgæti, og harafturat klæddi hann seg í dýrastu klæði, ið fáast kundu. Tað er ein maður, ið er nøgdur við tilveruna. Hann hevur rokkið øllum tí, hann setti sær fyri. Hann er í tí, sum menniskju vildu kallað, eini øvundaverdari støðu. Tað er ikki ofta, ein hittir slík menniskju.



Lázarus harafturímóti tykist at vera í einum syndarligum standi. Hann er ikki bert fátækur, men eisini sjúkur, og tað stendur, at hann varð lagdur við dyrnar hjá hinum ríka. Hann slapp at vera har og at eta seg mettan av tí, sum fall av borðinum hjá tí ríka. Eftir viðurskiftum tíðarinnar er hetta eitt slag av góðgerð og talar til fyrimuns fyri hinum ríka, at hann loyvdi Lázarussi at vera á hesum støði. Men stóra samkenslu fekk Lázarus ikki frá menniskjum. Tað vóru hundarnir, ið komu og sleiktu sár hans. Hetta er so tað, sum menniskju kunnu siga um hesar báðar. Um hin ríka hava tey ivaleyst sagt: "Hann eigur at vera eydnuríkur." Og um Lázarus: "Neyðars maður."

Men hetta, sum fólk síggja og siga um teir, er ikki sannleikin. Tað kemur klárt til sjóndar, tá teir fara úr hesum heimi.

## Tað er vandamikið at liva upp á tað, ein ikki kann doyggja uppá.

Vit menniskju stúra mest fyri, hvussu vit skulu koma ígjøgnum henda heim. Øll stremban og umsorgan gongur hjá teimum flestu út upp á tað. Men Jesus hevur gjørt okkum tað greitt, at slíkur ampi er bæði óneyðugur og vandamikil. Hetta síggja vit í kap. 6 hjá Matteusi, í Fjallataluni. Har verða vit ávarað ímóti stúran fyri tí, sum hesin heimur hevur at bjóða okkum, og okkum verður ístaðin lagt eina við at søkja Guds ríki. Tað, sum vit skulu hava ampa av, er, hvussu vit skulu fara úr hesum heimi. Fram um alt: Hvussu er støða mín, tá eg fari úr heiminum? Tað er júst tað, Jesus talar um í døminum um Ríka Mann og Lázarus. Dagur kom, tá Lázarus doyði. Tá hendi tað, at hann av einglunum varð borin í fang Ábrahams. Tað merkir, at Harrin sjálvur gjøgnum einglar sínar tekur hann og gevur honum heiðursess í nánd av Ábrahami. Vit kunnu ikki so mikið sum ímynda okkum ta eydnu og ta sælu, sum stóðst av hesum. Men eisini kom dagurin, tá hin ríki doyði, og um hann verður lagt afturat, at hann varð jarðaður Neyvan er hugsandi, at stórvegis ervi varð gjørt eftir Lázarus. Fáur mundi varnast, at hann var farin. Harafturímóti mundu mong geva ríka manni gætur. Mong rósandi orð mundi hann fáa við sær, hvussu eydnuríkur maður hann hevði verið. Helst hevur hann verið róstur til skýggja. Eingir einglar vóru har at bera hann burtur. Tá hann læt eygu síni upp, var hann í deyðsríkinum í stórari pínu. Langt burturi sá hann tá Ábraham og honum í nánd á heiðurssessi, Lazarus. Í pínslu síni rópar hann um linna, men tað er nyttuleyst, tað fær hann ikki, tí millum hansara og staðið hjá Ábrahami og Lazarus er staðfest eitt óført dýpi, har eingin kemur yvirum. Samband er einki millum hesi bæði støð.

## Svar Ábrahams til hin ríka mannin í deyðsríkinum.

Hetta svar sigur okkum, hví tann ríki maðurin er endaður í glatanini. Tað sigur okkum eisini, hvussu tað ber til, at Lazarus er frelstur og sælur. Hin ríki maðurin er glataður, tí hann hevur fingið sítt góða í jarðarlívi sínum. Lazarus er frelstur, tí hann hevur fingið tað ónda, meðan hann livdi. Hetta mega vit hyggja nærri at. Undantikið hetta, verður einki sagt um lív og levnað teirra, hvat teir hava verið og gjørt. Heldur einki verður sagt um syndir og misgerðir teirra. Hvat merkir tað at fáa sítt góða, meðan ein livir? Tað nýtist ikki at merkja, at hann hevur havt tað gott, meðan hann livdi. Tað merkir heldur ikki, at hann hevur verið ríkur. Mong menniskju hava tað gott uttan at hava fingið sítt góða í livitíð síni. Mong menniskju hava verið rík, uttan at verða glatað av teirri orsøk. Besta dømi um hetta man vera Ábraham, sum vit eisini hitta í hesum líknilsinum. Hann var ein ríkur maður, men fekk so sanniliga ikki sítt góða í jarðarlívi sinum. Hann var sum ein fremmandur og útlendingur í hesum heimi. Sæð við menniskjaligum eygum var lív hansara, á mangan hátt, ein einasta stór roynsla og samanhangandi líðing. Kortini var Ábraham bæði ríkur og eydnuríkur, eisini menniskjaliga sæð.

Fyri at finna svarið uppá, hvat hetta at fáa sítt "góða" merkir, skulu vit samanbera við byrjanina av sálmi 16, ein yndisligur songur av Dávidi: "Við Harran eg sigi." Tú ert Harri mín, mín lukka er eina hjá tær! (v 2). Orðið "Góða" merkir tað, sum gevur mannahjartanum heila og fulla nøktan. Tað sum ger, at mannahjartað ikki tráar eftir nøkrum øðrum, bert tað hevur hetta. Eydnast tað einum menniskja at finna hetta í hesum heimi og teimum lutum, ið her eru at finna, so er hetta menniskjað longu fokið og noyðist at fara í glatanina. Tá er sálarlív menniskjans og insta tráan tess farin fyri skeyti. Men úteftir sær hetta ikki soleiðis út. Henda sálarstøða vísir seg á tann hátt, at menniskjað er fullnøgt við tað, ið fáast kann burtur úr hesum heimi. Tráar ikki eftir meira. Livir hvønn dag í fagnaði og góðgæti og er fullnøgt við tað. Hvussu oyðiløgd ein slík sál er, vísir Jesus okkum við døminum um ríka manninum í deyðsríkinum. Ein skuldi hildið, at ein maður í hesi ræðuligu støðu fór at rópa eftir frelsu, syndafyrigeving og slíkum, stutt sagt, bjarging og frelsu frá tí, sum var orsøkin til, at hann endaði í glatanini. Men júst hetta biður hann ikki um. Hann biður um tað einasta, sum sálin megnar at biðja um. Ein dropa av tí sum hann hevur havt lív sítt á foldum í.

Orð Jesusar í Matt. 16,26 geva okkum røttu myndina av hesum: "Tí hvat gagnar tað manni, um hann vinnur allan heimin, men má bøta afturfyri við sál síni.? "Sál síni" er í veruleikanum ein hebraisk vending, ið er komin inn í hin grikska tekstin, við tað at Matteus Evangeliið av fyrstan tíð varð skrivað á arameiskum. Vendingin, "at bøta við sál síni", merkir "at missa seg

sjálvan" Tað er ein lýsing av, at øll persónmenskan er farin fyri skeytið. Tað sigur okkum, hvat glatan í veruleikanum er. At hava lív sítt og áhuga sín í teimum lutum, sum hoyra hesum heimi til, má enda galið. Menniskjaliga sæð kunnu tað vera góð ting, ið fylla sálina: List, bókmentir, manna-heimsspeki og annað, sum í hesum heimi verður nevnt andslív. Men tað er minni enn so nøkur sjálvfylgja, at hesi hava nakað við Gud at gera. Fyri Gudi og tí, sum hoyrir sálini til, er hetta fremmant.

So endar lívið og alt tað, sum hoyrir hesum lívi til, sovæl evnislig sum andalig ting falla burtur. Alt tað, ið gjørdi sálina nøgda, er ikki til longur. Gudi og tí, sum hoyrir heimi hansara til, hevur ein ikki so mikið sum fyritreyt fyri at spyrja eftir. Tá er ein komin inn í sjálvt Helviti. Tað er hetta Jesus vil frelsa okkum frá!

Viðurskiftini hjá Lazarussi vóru beint tey øvugtu. Hann hevði kent til tað ónda í sínum foldarlívi. Fyrst av øllum var tað fátækradømið og sjúkan. Men sál hansara kundi ikki laga seg eftir jarðiskum lutum. Kortini hevði Lazarus havt eitt ríkidømi. Tað skilja vit, tá vit hyggja at endanum á líknilsinum. Lazarus hevur hoyrt um lógina og profetarnar. Guds orð.

Hann hoyrdi heima í tí heimi, har Guds orð er. Tað var har, hann hevði sítt "góða". Menniskjaliga sá tað út sum ein vanlukka. Og framhaldandi sær tað soleiðis út fyri menniskjum í dag. Sum kristin koma vit í andstøðu til heimin. Tað hevur Jesus sagt við greiðum orðum. "Vóru tit av heiminum, tá hevði heimurin elskað sítt egna. Men av tí at tit ikki eru av heiminum, men eg havi útvalt tykkum úr heiminum, tess vegna hatar heimurin tykkum." Jóh. 15,19) .

Í Jóh. 16,33 sigur Jesus: "I heiminum hava tit trongd; men havið gott treyst, eg havi vunnið sigur av heiminum." Vit skulu eisini í hesum samanhangi taka orð Jesusar í høvuðsprestabønini Jóh. 17,14 við. Har sigur Jesus í bøn síni til Faðirin: "Eg havi givið teimum (lærusveinunum) orð títt, og heimurin hatar teir, av tí at teir ikki eru av heiminum, eins og eg ikki eri av heiminum." Hetta er galdandi fyri øll trúgvandi, sum taka ímóti orðinum, sum Jesus gevur okkum í gleðiboðskapinum. Av hesi orsøk vil Jesus ikki taka okkum út úr heiminum, sum hann eisini sigur í hesi bøn (V.15) "Ikki biði eg, at tú skalt taka teir burtur úr heiminum, men at tú skalt varðveita teir frá tí illa." Jesus hevur tørv á sínum trúgvandi í hesum heimi. Tey skulu bera frelsuverk hansara til menniskjuni, so tey kunnu hoyra um hann og verða frelst.

Men tað slepst ikki undan, at jú meira Guds orð fær loyvi at seta sín dám á okkum, meira gerast vit fremmand og útlendingar fyri medmenniskjum okkara, hóast tað er ætlan Guds, at vit skulu vera ljós í heiminum, og at tey skulu takka fyri okkum, tá tey síggja góðgerðir okkara.

Sum kristin verða vit staðiliga ávarað ímóti at elska heimin og teir lutir, sum eru í honum. Sí, til dømis, 1. Jóh. 2,15 ff. "Elskið ikki heimin, ikki heldur teir lutir, sum eru í heiminum. Um einhvør elskar heimin, tá er faðirsins kærleiki ikki í honum. Tí alt tað, sum er í heiminum, holdsins lyst (tað vil siga, lystir hjá gamla menniskjanum) og eygnanna lyst og lívsins dramblæti (tað vil siga, eitt høgt livistøði - júst tað, sum sermerkti tann ríka mannin), tað er ikki frá Faðirinum, men frá heiminum. Og heimurin fer til grundar og lyst hansara." Tað einasta, ið er - og kann vera hitt "góða" fyri tann, sum trýr á Jesus, er Harrin sjálvur, sum Dávid vitnar um: "Eg havi ikki annað góða enn teg." Tað sama síggja vit í sálmi 73,25: "Hvønn annan havi eg í hesum heimi, bert eg eri hjá tær, leggi eg einki í heimin!"

Vit kunnu tískil savna allan hugsunarháttin í líknilsinum í hesi orð Jesusar: "Tí at tann, ið vil bjarga lívi sínum, skal missa tað; men tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal finna tað (Matt. 16,25).

# Hin ríki bóndin. Luk. 12, 16-21.

Hetta líknilsið er sera einfalt. Tað avmyndar fyri okkum ein mann, sum vit verða ávarað ímóti at líkjast.

Tað er eitt sera álvarsamt líknilsi. Maðurin, tað her snýr seg um, er ein, ið endar í glatanini. Tað er vert at bíta merki í, at Jesus ikki bert greiðir okkum frá menniskjum, ið verða frelst; men - sum vit longu áður hava sæð - eisini um menniskju, ið ikki verða frelst.

Tað álvarsama við teimum, ið ikki verða frelst, er, at tey menniskjaliga sæð ofta eru stásfólk. Hesin maður, ið vit vanliga nevna hin ríka bóndan, hevur uttan iva verið ein dugnaligur megnarmaður. Jørð hansara gav nógv av sær. Ein og hvør royndur bóndi veit, at hetta ikki letur seg gera uttan hart arbeiði og strev. Hann er ein maður, ið ikki hevur søplað tíðina burtur. Jørðin hevur verið gagnnýtt, og vitugur hevur hann eisini verið. Hann kundi fyri tað verið ein góð fyrimynd hjá einum og hvørjum bónda. Tað er heldur einki í líknilsinum, ið peikar á, at Jesus brigslar honum nakað í so máta. Tað snýr seg sostatt um ein mann, ið fólk høvdu sagt um, at

hann hevur fingið nógv burturúr lívinum.

Kortini ávarar Jesus okkum ímóti at líkjast honum. Hann hevur útvegað sær nóg mikið til hendan heim, men tá hann verður noyddur at fara úr honum, hevur hann einki, ið er nýtiligt í komandi heimi. Um hann eru orð Jesusar í fyrsta líknilsinum vit viðgjørdu hóskandi, nevniliga Matt. 13: "Men tann, ið ikki hevur, frá honum skal verða tikið, sjálvt tað, ið hann hevur." (V12) í upprunastøðinum hevur líknilsið eina lýsing, og um somu tíð, eina ávaring frá Jesusi til okkara: "Ansið eftir og varið tykkum fyri øllum gírni, tí at um onkur hevur mikið góðs, so stendur tó ikki lív hansara í tí, hann eigur." (Luk. 12,15) Hesa ávaring gevur Jesus í eini ávísari støðu. Tað var ein maður, sum ikki fekk sín rættarliga arv, tí bróðir hansara setti seg ímóti hesum. Hann hugsaði tí, at Jesus mundi vera tann rætti at fáa hjálpina frá, so hann kundi ognast henda arv. Vilji Jesusar var jú altíð tað, sum var rætt og satt. Men tá hann bað Jesus veita sær henda beina, svaraði Jesus: "Maður, hvør hevur sett meg til dómara ella skiftingarmann tykkara millum?" (Luk. 12,14) Og so kemur Jesus við hesi hørðu ávaring ímóti ognargirnd, sum nevnd er omanfyri. Hetta er ein álvarsamur boðskapur til okkara. Tað er nógv ósemja millum fólk orsakað av arvatrætu. Slík ósemja kann elva til reinan fíggindsskap millum ættarfólk. Hon kann eisini gera enda á vinarløgum. Hon kann og hevur oyðilagt mongum lívið. Í slíkari arvatrætu hoyra vit ofta hetta: "Eg krevji jú ikki meira enn tað, eg havi rætt til. Eg má tá hava loyvi at krevja mín rætt." Tað kann tykjast undrunarvert, at Jesus júst í hesum sambandi ávarar ímóti ognargirnd. Jesus, sum júst er tann, ið hjálpir fátækum og øllum, ið líða neyð og órætt, ávarar brádliga tey, ið krevja rætt sín í arvastríði, móti ognargirnd. Hvat er havisjúka? Tað má vera, at tú brellast eftir at eiga meira, enn tær tørvar. 'Vit kunnu eisini kalla tað hugin at gerast ríkur. Vist er, í hvussu so er tað, at orð Guds leggur okkum dýran við at vera nøgd við at hava mat og klæði og tað, ið okkum tørvar til lívsins uppihald. Samanber l.Tim. 6,8. Bíblian er eisini full av ávaringum ímóti ynskinum um at gerast múgvandi. Og Jesus hevur týðiliga sagt, at tað er torført hjá teimum ríku at koma inn í Guds ríki. Ja, tað er so torført, at tað fyri menniskjum er ógjørligt (Mark. 10,27). Tað er ein veruleiki, at fólk, ið hava nógvan pening, sjáldan verða frelst. Skriftin sigur jú eisini, at um ein kristin skuldi verið í teirri støðu, at ríkidømið veksur, má hann ikki geva tí gætur. (Sl. 62,11). Eftir hetta kunnu vit venda aftur til líknilsið. Hin ríki maðurin kundi vælnøgdur hyggja aftur um bak at úrslitinum av strevi sínum. Hann hevði nógv liggjandi til mong ár. Tað gjørdist neyðugt at byggja nýggjar løður at savna tað í, sum hann átti. Og nú ætlaði hann at njóta fruktirnar av strevi sínum. Við seg sjálvan sigur hann: "Sál, nú hevur tú mikið góðs og fæ niðurfyri til mong ár, hvíl teg nú, et og drekk og ver glað." "Sál" merkir sjálv persónmenskan. Hann talar ikki bert um trivna likamsins og tað, ið hoyrir tí til. Men hann talar um alla tilveru sína sum menniskja og persón,- tað er galdandi fyri ytra og innara lívið. Hann er vísur í at hava allar fyritreytir fyri eini framtíðar tilveru í fagnaði í hesum heimi. Tá kemur Gud til hansara og sigur, at nú er úti við øllum. Hansara persónur skal ikki vera í heiminum longur. Gud leggur hald á persónin. Hann skal út úr heiminum og inn í ævinleikan. Hagar kann hann einki taka við sær av tí, hann hevur livað og stríðst fyri. Hann er sostatt glataður. Og Jesus leggur afturat: "Soleiðis gongst tí, sum savnar sær ríkidømi og ikki er ríkur í Gudi."

Ongantíð hevur hetta líknilsi verið meira viðkomandi enn í okkara tíð. Sum støðan er í dag,

tykist alt at snúgva seg um status-symbol og livifót. Tað elvir til øvund og hatur, til lønarósemjur, og stættarstríð, til kúgan og týningarlegur, til kríggj, neyð og vanlukku. Endin á øllum verður so ævig glatan. Jesus kemur at geva okkum nakað heilt annað. Hann nevnir seg sjálvan hin góða hirðan (Jóh. 10) . Við honum kemur ævigt lív, frelsa og sæla. Jesus hevur givið okkum tað, vit kunnu doyggja uppá, og sum ikki bert fylgir okkum inn í ævinleikan, men ikki kemur til sín fulla rætt, fyrr enn vit fara úr hesum heimi. Av røttum kann ein kristin vitna: "Tí at lívið er mær Kristus og deyðin ein vinningur."

So verður tá høvuðssaman-drátturin: Liva vit upp á tað, sum vit kunnu doyggja uppá.?

Suni Jacobsen,
týðir.

# Hvagar fór Jesus, tá ið jólamaðurin steig fram

David Marshall

Eg var bara trý ára gamal, tá ið eg gjøgnumskoðaði lygisøguna um jólamannin. Ikki so at skilja, at eg var eitt undurbarn. Hin tjúkki maðurin, sum lúrdi seg inn á kamar mítt og legði eitt koddaver við nógvum áhugaverdum í við song mína, var uttan iva pápi mín. Sjálvt í myrkri!

Sum fimm ára gamal var eg so púra vónsvikin av jólamanninum. Býurin, har vit plagdu at keypa til jóla, var yvirfloymdur av reyðklæddum, vattskeggjutum, posaberandi, herðabreiðum mannfólki. Fyrstu ferð, eg kom í nánd av einum teirra, var hann í holt við at stjala pungin frá einari konu, sum var farin til handils. Mamma mín syrgdi fyri, at hann varð handtikin.

Ta søguna gloymdi eg ikki. Í skúlanum sat lærarin og segði frá tí gomlu, ævigt ungu søguni um Jesus, hirðarnar, fjósið, stjørnuna, teir vísu menninar og gávurnar, teir bóru, gull, roykilsi og myrru. Brádliga legði hann afturat: "Og um tit nú eru fitt og góð, fer jólamaðurin heilt vist at geva tykkum nakrar jólagávur..."

Tað var ov mikið fyri meg. Eg fór at siga frá tí tjóvska jólamanninum. Vinmenn mínir vórðu skelkaðir, teir grótu, alt var ein hurlivasi og øsing - og vit vóru enntá bara dreingir í flokkinum. - Lærarin gjørdist í øðini: "Marshall, tú skalt bara **vága** tær!"

Ein av vinmonnum mínum bjargaði mær við einum spurningi, sum fekk bæði læraran og allan flokkin at tagna: "Tygum lærarin, hvat hendi við Jesusi, tá ið jólamaðurin steig fram?" Lærarin visti einki at svara.

Men svarið er hetta: Hann varð gloymdur. Eitt skelti við áskriftini "Einki rúm er eftir" varð hongt uppi yvir tí gongustjørnuni, hann kom at frelsa. Og tann tíðin á árinum, tey kristnu kalla "adventstíðin", verður mest av øllum ein "forbrúkaraveitsla", ein algoyst tuskan, har vit skulu bera hvør av øðrum og náa mest møguligt. Adventstíðin skuldi verið fyrireikingartíð, har vit skulu minna hvør annan á sannleikan, at Jesus gjørdist menniskja, og vit skulu minnast, at tað barnið, sum ta ferðina varð føtt undir trongum korum, skjótt kemur aftur sum konganna Kongur.

"Orðið varð hold og tók búgv okkara millum, og vit skoðaðu dýrd hansara". Men tað, sum er uppaftur størri, hann kom at frelsa fólk sítt frá syndum teirra. Fyri at geva okkum frelsu.

Latið ongantíð ein gamlan jólamann fáa loyvi at troka burtur henda sannleikan!

"Tidernes tegn".

Effie Campbell,
týddi

BRÆV

# Brev fra Etiopien

Addis Abeba, den 26. oktober 2007

Jørgen Bernhard skrivar

Kære familie, venner og medarbejdere!

Etiopien er et utroligt fascinerende land med en kulturel mangfoldighed spændende fra den ortodokse kirkes ældgamle liturgiske traditioner til dyrkelse af forfædrenes ånder og den sataniske verden hos de mange stammefolk. For slet ikke at tale om den vidt udbredte islamiske kultur og tradition. Men det er jødisk tro og kultur, der har de længste rødder i den etiopiske historie med historien om dronningen af Shabas besøg hos kong Salomo i Jerusalem. Deres søn førte pagtens ark fra Jerusalem til Etiopien, hvor den befinder sig den dag i dag. Det skulle være ganske vist. Etiopien er således en smeltedigel af jødedom, kristendom, islam og traditionel afrikansk religion.

"Kom til Etiopien og bliv 7 år yngre!" Sådan lyder et slagord møntet på turister. Og rigtig mange etiopiere fra udlandet kom hjem i forbindelse med fejringen af årtusindskiftet - 7½ år senere end resten af verden. Den 12/9 var den 1/1 år 2000 her til lands. Addis Abeba er oplyst om aftenen af en mængde lys i de etiopiske farver grøn, gul og rød til markering af det nye årtusinde. Flagene vejrer over et selvstændigt Etiopien, som aldrig lod sig knægte af de europæiske kolonimagter. Flagets farver symboliserer landet: grøn for den frugtbare, dyrkede jord i højlandet, gul for det tørre, hede lavland, for klipper og bjerge, rød for Rødehavet, som adskiller det kristne Etiopien fra de muslimske naboer samtidig med, at det binder det muslimske Etiopien sammen med disse.

I Addis Abeba såvel som i Jinka høres et par kraftige højtalere hver morgen en time før, det bliver lyst. Den muslimske stemme kalder til bøn, det er bedre at bede end at sove. Allah er den lovpriste. Den ortodokse kirkes stemme rummer bøn til Gud og lovprisning. De protestantiske kirker er fra tid til anden også med i højtaler-koret, når man samles til gudstjeneste. Så lyder prædiken og bøn ud over et stort område. Der er kamp om sjælene, og kampen skærpes. Til forskel fra bare sidste år ses i dag i Jinka ikke så kvinder med muslimsk tøj og slør. Den nye minaret rager højt og forkynder Allah flere gange dagligt for byens tusindvis af indbyggere. Islam sigter på dominans.

Som mission arbejder vi sammen med Mekane Yesus Kirken. Og vi kan med glæde fortælle, at vores kirke ikke ligger på den lade side. Lad mig give et par glimt. En søndag prædikede jeg i en menighed, som netop havde haft årsmøde for 16. gang. I løbet af disse år havde folk fra omegnen sluttet sig til menigheden i så stort tal, at der var grundlagt nabomenigheder fire forskellige steder. Én menighed var blevet til fem i løbet af 16 år. Sådan vokser Guds rige i Etiopien. Jeg besøgte en af disse nye menigheder. Her var man vokset ud af kirkehytten med stråtag og havde bygget en ny stor kirke med tag af bølgeblik. Jeg havde kørt tagpladerne ud til dem sidste år, og nu stod der en fin ny bygning. Og kirken var fuld af børn og voksne 200-250. Gudstjenesten varede tre timer. Der er lydhørhed, når Ordet forkyndes, og folk tager imod evangeliet om Jesus, de vender sig bort fra den gamle satandyrkelse og bekender sig som kristne.

En dag kom et par evangelister og fortalte, at 85 voksne nye troende var blevet døbt i Hatsi-folket. For 1½ år siden gik nogle af vore folk sammen med dr. Torleif ud til disse mennesker, som bor isoleret og langt fra alfarvej. De havde aldrig hørt noget fra Bibelen. De sagde: "Vi ved, at Gud har skabt det, vi kan se, men så er han gået bort, og vi ved ikke, hvor han er. Kan I ikke komme og fortælle os det". En evangelist har nu undervist dem i et årstid, og 85 er blevet døbt. Lov og pris! Sådan løses mennesker fra Satans magt og går ind i Guds rige. Evangelisten kom med et brev og bad om hjælp til indkøb af 80 tagplader og søm, så ville de bygge et bedehus, det første blandt disse Hatsi-folk.

Mange andre lignende eksempler kunne fortælles. I Jinka distrikt har vi nu 80 menigheder og prædikepladser. Men lad mig sige lidt om bibelskolen. Det har været et sejt træk at få undervisningen i gang igen. I øjeblikket er der 10 elever, som vi takker Gud for, mest modne folk med kone og børn hjemme, op til 8 børn. Disse elever er startet på et årskursus, og vi håber flere kommer til hen ad vejen, nemlig sådanne som tidligere har været på et tre måneders kursus. Christian er nu i gang med undervisningen. Fint, for der er stort behov for indføring i Bibelen og troen. De kristne skal grundfæstes i sandheden. De vil nemlig meget snart blive udsat for den almindelige verdslige og kommercielle indflydelse inklusiv massemediernes voldsomme påvirkning, som hastigt er på vej ud til dem. Mobilen er nået til Jinka. Der foregår et enormt vejbyggeri, som vil åbne hele området op for en kraftig materialisme. Det er Guds forsyn, at evangeliet er kommet før hele denne sekulære udvikling, som nu trænger sig på godt og ondt.

Skal disse stammefolk, som hidtil har levet i egne lukkede kulturer, overleve som kristne, må de have en åndelig kraftkilde at øse af. De må have Guds Ord og erfare rigdommen i evangeliet om Jesus. Bibelordet har en iboende kraft, som ikke er af denne verden. Det ord skal vi give de mange folkeslag i Syd Omo. Det er vores kald. Guds Ord vil ikke vende tomt tilbage til den himmelske afsender.

Mit ophold er ved at være slut for denne gang. Hjørdis har holdt skansen hjemme, og snart skal vi være sammen igen. Tak til jer i Etiopien for godt fællesskab. Jeg har haft en rig tid sammen med mange fine mennesker, etiopiere såvel som missionærer. Men det var en stor sorg, at vores bror i Herren evangelist Damene Sigane så brat blev hentet hjem til herligheden for et par uger siden. Herrens veje er uransagelige. Bed for hans hustru Mestewat og deres 6 børn.

Visionen, jeg tager med mig hjem, er en vidt åben dør for evangeliet blandt stammefolkene i det sydvestlige Etiopien. Bed derfor høstens Herre sende arbejdere ud til de høstmodne marker. Det haster! Der kommer en nat, da ingen kan arbejde mere.

Med kærlig hilsen fra

Jørgen Bernhard.



## Haldaragjaldið

Uppkrav fyri haldaragjald fyri 2007 er sent haldarunum.

Haldaragjaldið er sum áður nevnt sett til kr. 150,00.

Minnist til at gjalda haldaragjaldið. Verður tað ikki goldið, ber postverkið ikki blaðið út.

# Gabriel Eikli greiðir frá

Fyrsta skeiðið í kristniboðsvirki okkara, vardi í heili tíggju ár. Í trý og eitt hálvt ár, høvdu vit einki samband við Noreg. Vit vóru innibyrgd í krígsherjaða Manschuria. Mitt í hesi støðuni, var maturin farin at ganga undan. Vit komu ígjøgnum tað við lívinum, men tey vóru mong sum ikki hóraðu undan í hesi tíð.

Tað myrkti tíðliga, so kvøldini gjørdust long. Skýmligt var inni, einasta ljósið, var ein skál við feitti og einum veiki í.

At stákast til jóla, hevur altíð havt ein serligan hugna við sær, serstakliga tá ei er langt heimanífrá.

Hvussu maturin rakk til í hesum krígsárunum, var fyri okkum ein gáta. Um matur kundi keypast, hvat skuldu vit so gjalda við ? Hetta við pengum var eisini ein trupulleiki.

Jólini 1944, sóu út til at blíva so fátakslið, sum ongantíð fyrr. Jólini nærkaðust og í hesum trongu tíðum høvdu vit næstan ongan mat eftir. Men ongantíð fara vit at gloyma jólaaftansnátt.

Ei av kristnu vinum okkara, var komin inn til býin við einum lessi av viði. Undir viðin hevði hann lagt eitt stykki av svínakjøti. Hetta skuldi vera ei jólaheilsan til nakrar kristniboðarar.

Maðurin hevði klintra uppá tann høga múrin, rundan um missiónsstøðina, har hann slepti kjøtið niður beint uttanfyri sovikamar okkara. Eg hoyrdi onkran teska: “Ai – Mo – Stryk”, sum merkir : Pastor Eikli. Eg lat meg í og fór út í tað køldu myrku náttina.

Eg teskaði til okkara kæra vin í myrkrinum. “Hsihj, hsijh”, sum merkir: “Takk takk”. Meira varð ikki tosað okkara millum. So var eftir at vakja fólk, at hjálpa til at skera sundur. Tað skuldi býtast ímillum okkum øll. Vit vóru umleið átta vaksi, umframt nøkur børn.

Táið eg líti aftur um bak og hugsi um hesi ár, má eg bara undrast yvir, at vit komu ígjøgnum hesa tíðina og at alt lagaði seg so væl. Eg hugsi eisini um allan kærleikan og umsorgan, sum vístur varð okkum av japanskum, kinesiskum og russiskum kristnum.

Vit upplivdu av sonnum, hvat tað heilaga samfelagið er og hvat Harrin Jesus Kristus, kann útinna gøgnum vinir sínar. Vit upplivdu til fulnað í lyftið í missiónsboðunum:

“ Sí eg eri við tykkum allar dagar”.

Lea Juul týddi

## Nýggir haldarar

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr. og bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Purkugerði 7, FO-100 Tórshavn

# Tann hvíta rósan

Tað, ið eg her fari at endurgeva, hevur ein evangelistur í London sagt mær. Eg fari at royna sum best at brúka hansara egnu orð.

Summarið var farið at halla. Eitt kvøldið í skýmingini gekk eg fram við ánni Themsen á veg til samkomuhúsið, har eg skuldi tala, tá ein undarlig kensla fekk tak á mær. Eg gekk spakuliga, steðgaði so á eina løtu og hugdi niður í ánna. Eg hugsaði um, hvat hesin áarbakkin ígjøgnum øldir hevði verið vitni til. Viðhvørt kunnu slíkir tankar gera meg kenslubornan, men í kvøld øktu teir bara mítt tunglyndi. Hvussu mong av teimum túsundtals menniskjum, sum í øldir høvdu gingið her, høvdu kent tann hjartafrið, sum bert Gud kann geva, hugsaði eg. Hvussu nógvir av íbúgvunum í London, høvdu upplivað frelsu sálanna í kvøld?

Eg fór til gongu, tí nú nærkaðist møtitíðin. Tá var eg brádliga varur við eina unga kvinnu, sum reisti seg av einum beinki og kvikliga fór gangandi móti áarbakkanum. Tað var okkurt við atferð hennara, sum gjørdi meg bangnan, so eg skundaði mær ímóti henni. - Steðga! Segði eg róliga. Hon hvakk við, meðan hon hugdi rundan um seg. Tað sást týðiliga at fjáltur var á henni. Kanska var hon rýmd undan onkrum. Hon var í myrkum klæðum, bleik í andliti, og eyguni søgdu frá djúpastu sorg og vónloysi.

Eg varð illa við, sjálvt um eg í mínum arbeiði var vanur við slíkt millum tey ólukkuligu í samfelagnum. – Orsaka, at eg sum ein fremmandur tosi við tygum, segði eg, - men eg eri prædikumaður og á veg til húsini har yviri. Tygum eru ólukkulig og í neyð. Koma tygum ikki við á møti í kvøld? Kanska er onkur har, sum kann hjálpa tygum?

Tá eg nevndi orðið prædikumaður, var tað sum eitt skýggj fall yvir andlit hennara, og hon segði vanvirðisliga: - Nei, eg komi ikki við. Eg vil onki hava við religión at gera. Lat meg fáa frið! Fyrr um dagin hevði eg vitjað nøkur vinfólk. Tá ið eg fór, fekk eg eina hvíta rósu frá teimum. Eg plagdi ikki at ganga við einum blomstri í knappholinum, men nú festi eg tað í har.

Eg skilti ikki hví, men knappliga tók eg rósuna úr knappholinum og rætti henni hana. Ein løgin atburður, hugsaði eg, men eg tordi ikki at vera ólýðin ímóti áminningini, eg hevði fingið. - Vilja tygum ikki taka ímóti hesi rósuni? Spurdi eg. – Kanska hon kann minna tygum á, at í samkomuhúsinum eru fólk, sum vilja hjálpa tygum? Hon fór aftur eftir hali, sum um at eg hevði sligið hana. – Nei, nei, suffaði hon, men til mína undran rætti hon hondina fram og tók rósuna. Eg sá, at hon táraði. Nú mátti eg fara, men áðrenn eg fór, bað eg hana einaferð enn koma á møti.

Á møtinum kundi eg ikki lata vera við at hugsa um tað, sum mær hevði verið fyri. Eg hevði sæð eitt menniskja í djúpastu sálarneyð. Eg vildi so fegin hjálpt henni inn á tann rætta vegin, sum førir til frelsu og frið. Tá ið eg var liðugur at tala, sá eg ta ungu kvinnuna, sum eg hevði tosað við, sita aftarlaga í salinum. Eg varð glaður, so var hon kortini komin. Kanska kendi hon Guds kall. Tað var hann, sum hevði mint meg á at tosa við hana.

Møtið var liðugt, og fólk vórðu boðin at koma fram. Eg sá hana reisa seg kvikliga og fara fram. Hon byrjaði at tosa, steðgaði á eina løtu, men helt so fram. Hon var helst ikki greið um, at samkoman sat í spenningi og lurtaði. - Eg eri biðin um at koma til Jesus í kvøld, og tað vil eg. Halda tit, at hann kann frelsa ein slíkan syndara sum meg? Spurdi hon grátandi. Men áðrenn nakar fekk svarað, segði hon: - Eg ætlaði at loypa í ánna í kvøld, tí eg kundi ikki halda fram við tí lívinum, ið eg havi livað í fimm ár. Eg var til reiðar at leypa útí, tá ið hesin maðurin steðgaði mær og bað meg koma higar. Eg segði nei, men so gav hann mær eina hvíta rósu. Í fyrstuni vildi eg ikki taka ímóti henni, hon var ein ímynd um nakað, ið eg hevði mist. Men eg mátti taka ímóti henni. Hon líktist júst rósuni, sum mamma gav mær, tá ið eg fór heimanífrá fyri fimm árum síðani. Hetta var hennara yndisblóma. Tá eg tók ímóti rósuni í kvøld, hoyrdi eg røddina á mammu, tá hon segði mær farvæl: "Elin, barn mítt, eg bangin fyri, at tú fert frá mammu tíni ímóti hennara vilja og út í eina synduga verð og eitt syndafult lív. Tá ið tú ert langt burturi og sært eina hvíta rósu, minst tá til rósuna, sum mamma tín gav

tær. Nátt sum dag vil eg biðja Gud um at senda teg frelsta heim aftur."

- Henda reina hvíta rósan gav mær nakað at hugsa um í kvøld. Eg visti, at nú mátti eg finna vegin til frelsu, um so er, at hann er opin fyri mær. Halda tit, at hann leggur nakað í ein slíkan syndara sum meg? Tað var ikki torført at svara hesum spurningi. Komið, latum okkum fara fyri rættin, sigur Harrin. Um syndir tykkara eru sum skarlak, kunnu tær verða hvítar sum mjøll; um tær eru reyðar sum purpur, kunnu tær verða hvítar sum ull." Jesaja 1.18. Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív." Jóh. 3,16. Hon lurtaði væl eftir, meðan vit lósu hesi og onnur skriftstøð fyri henni. Men so brast hon útúr at gráta og fall á knæ. Hon reisti seg upp sum ein nýggjur skapningur í Kristi Jesusi. Fyrsta ynski hennara var at fara heim til mammuna.

..........Árini gingu, greiðir evangelisturin frá, men henda kvinnan, sum ætlaði at beina fyri sær, livir saman við Gudi og vitnar um Jesu frelsandi mátt. Hon takkar altíð Gudi fyri eina hvíta rósu, sum ein fremmandur maður gav henni.

Anne Hazeton
Lea Juul týddi

# Gentan, sum vann Jesusbarnið

Lena stóð og vendi sær bæði væl og leingi framman fyri tí stóra, gamla speglinum í stovuni, áðrenn hon snaraði sær móti mammuni og nikkaði: "Kjólin bleiv bara fínur, mamma!"

Men innan í sær hugsaði hon mótfallin, hvør onnur genta mundi fara at koma í jólaveitsluna í einum gomlum, umseymaðum bummullarkjóla. Hon visti bara, at foreldrini heldur ikki hesi jólini høvdu ráð at keypa henni nýggjan kjóla.

"Íðan," segði mamman, "so rópi eg á Jan, so kunnu tit fara. Veitslan byrjar um ein tíma."

Lena gekk undir liðini á Jani, tí fimm ára eldra bróðurinum. Tað var kalt, og kavin brakaði undir fótunum. Mánin, sum stóð so bleikur á tí myrka himlinum, gjørdi, at skuggarnir undir trøunum tóktust so trølskir.

Lena tók fast í armin á beiggja sínum. Henni dámdi einki hesar skuggarnar; men undir liðini á stórabeiggja kendi hon seg trygga kortini.

"Tú, Jan," spurdi hon brádliga, "hvat munnu tey fara at luta burtur á jólaveitsluni í kvøld?"

Tey plagdu nevniliga á hvørjum ári at luta fýra ting burtur á jólaveitsluni til frama fyri Barnahjálpargrunnin.

Lena var ógvuliga spent at frætta, hvørjir lutir skuldu lutast burtur hetta kvøldið. Hon hevði fingið pengar frá mammu síni, nóg mikið til ein lutaseðil. Jan kroysti hond hennara. "Eg havi sæð høvuðsvinningin; men eg sigi ikki, hvat ið hann er. Tað skal vera eitt loyndarmál, til tú sært hann sjálv. Men hann er okkurt ómetaliga vakurt, skal eg siga tær."

"Á, Jan, sig tað," bað hon so miriliga og togaði í ermuna hjá honum. Men Jan risti við høvdinum. Lena skilti, at hann gekk ikki frá sínum, og meðan hon gekk, bleiv hon við at hugsa um, hvat ið hetta "ómetaliga vakra" kundi vera fyri nakað, og hon hugsaði um tað allan vegin, líka til tey komu til missiónshúsið, har veitslan skuldi vera.

Hon trýsti myntin fast inn í lógvan. Hann mátti hon ið hvussu er ikki missa, tí tá hevði hon eisini mist møguleikan at vinna hetta, sum var so "ómetaliga vakurt".

Tey fóru úr frakkanum, og Jan greiddi tað langa, ljósa hárið á henni, áðrenn tey fóru inn í salin.

Stúgvandi fult av fólki var inni har, mest børn, og Lena helt, at øll vóru nógv fínari enn hon. Hon kendi seg gráa og keðiliga í tí puntuta kjólanum.

Mitt á gólvinum í salinum stóð jólatræið og glitraði í øllum sínum skreyti. Undir liðini á jólatrænum stóð borðið við vinningunum. Hon kvikaði sær yvir hagar. Har varð hon standandi, still og smæðin. Nakað so yndisligt, ja, nakað so ómetaliga vakurt, hevði hon ongantíð á ævini sæð.

Eyguni í Lenu glógvaðu. Mitt á borðinum lá sjálvt Jesusbarnið og svav á hoynum í sínari krubbu. Tað hevði sóljugult hár og eitt lítið hvítt klædnastykki rundan um seg.

Gaman í var tað ein ljósareyð blundidukka, sum lá har; men fyri Lenu var dukkan sum eitt veruligt, livandi Jesusbarn. "Hugsa tær til, um eg vann tað," tonkti hon og kendi, hvussu hjartað dukaði inni í bringuni. "Tá hevði eg verið ómetaliga glað!"

Tann ungi maðurin, sum stílaði fyri veitsluni, helt eina lítla talu. Aftaná gjørdu børnini tríggjar ringar rundan um træið. Tey sungu allar teir kendu jólasangirnar, sum tey høvdu lært.

Lena leiddi Jan øðrumegin og ein gamlan mann hinumegin. Hon kendi ikki tann gamla mannin; men hon hevði sæð hann nakrar ferðir. Smíli-Espen kallaðu

tey hann, av tí at hann hevði so ógvuliga stórar smílikullur í kjálkunum. Lena helt, at hann sá so ómetaliga fittur út. "Eg kundi væl hugsað mær at havt hann til abba," hugsaði hon, "báðir abbarnir hjá mær eru jú deyðir."

Tey gingu bæði leingi og langt rundan um træið, og Lena fór at gerast móð í beinunum. Smíli-Espen segði einki við hana; men hann smíltist ofta, og Lena smíltist aftur. Alla tíðina hugdi hon eftir Jesusbarninum yviri á borðinum, men tað svav líka gott og trygt í krubbu síni.

Í steðginum fingu tey sum vant kakao og bollar við smøri. Ein gráhærd kona gekk og seldi seðlar, meðan tey ótu. Lena tók myntin fram og keypti sær ein seðil. Hon legði hann í kjólalumman og helt, at veitslan fór at ganga ógvuliga seint, nú móti endanum, tá ið tey fóru at draga. Jan rykti spakuliga í hárdoddin á henni og teskaði: "Nú ert tú spent, góða!" Lena nikkaði smílandi og eitt sindur sperd.

Ikki fyrr enn klokkan átta fóru tey at draga vinningarnar.

Lena stardi og stardi at nummari sínum. Tríggir teir fyrstu lutirnir vóru allir farnir til sínar glaðu vinnarar. Bara Jesusbarnið var eftir. Tað var sera kvirt í salinum, meðan hin ungi leiðarin las seinasta nummarið, sum hevði vunnið. "Henda yndisliga dukkan," segði hann, "fer til tann, sum hevur nummar B 13."

Lena hugdi og hugdi at sínum nummari, men uttan mun til, hvussu ofta hon las tað, sum stóð har, so bleiv tað ikki B 13. Hon kendi, hvussu tárini pressaðu seg fram, og hon fekk ikki svølgt longur, tí ein stórur, tjúkkur klumpur fylti hálsin - gráturin var nær. Alt í einum tók hon hendurnar fyri andlitið og leyp út í gongina.

Higstandi seig hon niður á ein bonk og varð sitandi millum øll yvirklæðini, sum hingu niður á bonkin.

Hon græt og græt og helt, at hjartað fór at bresta innan í sær. "Eg misti Jesusbarnið!" higstaði hon fyri seg sjálva. "Eg misti tað!"

Hon sá Jesusbarnið við tí sóljugula hárinum fyri sær. Tað svav trygt í krubbuni. Hon fór ongantíð at eiga tað!

Við eitt kendi hon ein stóran neva á økslini. Hon kveitti upp. Gjøgnum tárini hómaði hon bara tvær stórar smílikullur. Men hon visti, at tað var Smíli-Espen, sum stóð har.

"Men hvat bagir hesari fittu smágentuni, ha?" spurdi hann og stardi syrgin at henni.

"Eg tapti! Á, eg misti Jesusbarnið!" Lena goymdi andlitið niður í fangið, og lítli ryggurin ristist, sum hon græt.

"So, so, góðasta - hygg her! Hygg, hvat ið eg havi á arminum!" segði Smíli-Espen.

Gráturin steðgaði. Lena turkaði tárini og hugdi varisliga upp.

Hygga síggj, stóð hann ikki har við Jesusbarninum á arminum! Tað var Smíli-Espen, sum hevði vunnið tað!

Gamli maðurin kíndi henni eftir hárinum og segði: "Tú mást minnast til, at hetta er ikki tað veruliga Jesusbarnið, men bara ein lítil ímynd um tað. Tað veruliga Jesusbarnið kunnu vit ikki vinna á einum lutaseðli; men vit kunnu lata okkara hjarta upp og elska tað lítla Jesusbarnið, sum livdi langt síðani. Tað lítla barnið vaks upp og vildi frelsa øll heimsins menniskju, eisini teg og meg. Hann elskar okkum øll, hvørji vit eru, og hvussu vit eru. Hann vil fegin hjálpa okkum, um vit loyva honum. Um tú vilt lova mær, at tú ikki fert at elska hesa dukkuna meir enn tað lítla veruliga Jesusbarnið, sum livdi langt, langt síðani, so skalt tú fáa hesa dukkuna frá mær!"

Lena skilti ikki, at hetta var satt. Hon bara teskaði, so tað næstan ikki hoyrdist: "Ja."

Smíli-Espen gav henni krubbuna við dukkuni, og Lena fjaldi andlitið niðri í tí sóljugula hárinum á dukkuni og græt aftur; men hesa ferð vóru tað gleðitár.

Nei, sanniliga var hetta ikki tað veruliga Jesusbarnið, bara ein yndislig dukka. Men hon ætlaði sær at ansa so væl eftir hesari dukkuni og hugsaði, at soleiðis, ja, uppaftur betur skuldi hon havt ansað og røkt tað veruliga Jesusbarnið, um hon hevði fingið loyvi til tess.

Hon fór á føtur og rætti Smíli-Espeni hondina: "Á, túsund, túsund tøkk. Tú ert sum ein rættur abbi. Og eg skal nokk minnast tað, tú hevur sagt - eisini, tá ið eg gerist vaksin!"

Á heimleiðini var hon so glað sum ongantíð fyrr, har hon aftur gekk undir liðini á Jani.

Vist var hon glað, at hon hevði vunnið hetta Jesusbarnið, sum dukkan ímyndaði; men tað, sum gleddi hana uppaftur meir, var tann stóri sigurin, sum hon hevði vunnið innan í sær. Hon ætlaði sær at royna av øllum alvi at halda hesi orðini, sum Smíli-Espen hevði sagt, nevniliga at hon ikki mátti elska dukkuna meir enn tað veruliga Jesusbarnið! Og hon gjørdi av, at hetta skuldi hon altíð minnast.

Effie Campbell,

týddi

# BARNASÍÐAN

## Jesu føðing

Fyri meira enn tveytúsund árum síðani var tað ein keisari, sum æt Augustus, og hann ráddi yvir mongum londum, og eisini yvir Ísrael, landinum haðani Jesus var ættaður. Hann vildi fegin vita, hvussu nógv fólk búðu í hansara ríki, og tí gav hann boð um, at øll fólkini skuldu fara til býin, haðani tey vóru ættað.

Jósef og Maria fóru so úr Nasaret, har tey búðu, til Betlehems at verða skrivað í manntal. Ferðin var strævin og serliga fyri Mariu, sum var við barn. Tá ið tey komu til Betlehems, funnu tey onki hús at búgva í, tí býurin var stúgvandi fullur av fólki. At enda funnu tey eitt fjós, og har var Jesus føddur.

Somu nátt, sum Jesus var føddur, sótu nakrir hirðar úti á markini og ansaðu eftir seyði sínum. Knappliga var ein eingil hjá teimum og fortaldi teimum, at heimsins frelsari var føddur í einum fjósi í Betlehem.

Hirðarnir skundaðu sær so til Betlehems, og teir funnu Jesus. Teir søgdu Jósefi og Mariu frá tí, sum einglarnir høvdu sagt, at frelsarin, sum øll so leingi høvdu bíðað eftir, nú var føddur. Síðani fóru hirðarnir út aftur á markina, og teir lovaðu og takkaðu Guði fyri, at hann hevði sent Jesus í heimin, tí nú vistu teir, at teir altíð kundu koma til Jesus og fáa syndanna fyrigeving, og at Jesus kundi vísa teimum vegin til Guds.

*Postavgreitt blað*

# BARNASÍÐAN

**Hyggið at myndunum av Jósefi, Mariu og Jesusi og finnið tíggju ting, sum mangla á niðastu myndini.**






*Umbróting:* Brandur Petersen

*Prent:* Estra

*Ábyrgd:* Kristian Thorleifsson

*Útgevari:*
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Purkugerði 7
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 225511
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað kemur út 8 ferðir um árið (1/2, 15/3, 1/5, 15/6, 1/8, 15/9, 1/11, og 15/12)

Haldaragjald: kr. 150,-